## Nólsoyarkabarettin farin til verka

Kabarettin er afturvendandi tiltak á ovastevnu. Hon hevur ofta víst nólsoyingum og gestum, at á oynni eru nógvir frálíkir sjónleikarar. Afturat tí er hugflogið frítt, og umstøðurnar í Royndarhúsinum eru soleiðis, at áskoðararnir til „Grønu sproytuna‰ eru nær leikarunum og tí fáa heilt øðrvísi upplivilsi. Kabarettin plagar at verða framførd báðar dagarnar.

## Fjølbroyttur tónleikur á ovastevnu

Fríggjakvøldið verða nakrar forvitnisligar konsertir í Nolsoy í sambandi við ovastevnu. Tá fara Bendar Spónir, Petur Háberg Band og Side Effect at dundra í tjaldinum á Klivum. Talan er um bæði aktuellar og óroyndar bólkar, ið venja undir trongum umstøðum í Havn. Tiltakið skalsambært fyriskiparunum metast sum ein stuðul til hesar bólkar. Tað er Studio Oyravox, ið skipar fyri, og ætlanin er, at nýggja tiltakið skal verða afturvendandi.

# una burturbeinda



Mynd: Jens Kr. Vang



*Sonni Johansen og Sunleiv Højgaard, ávikavist virkandi borgarstjóri í Sjóvar kommunu og brunaumsjónarmaður hjá Skálafjarðar Sløkkiliði*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

eisini verið serkøn fólk á økinum.

- Eg hevði í hvussu er væntað, at vit fingu eina betri frágreiðing um, hví oljan ikki varð tikin úr skipinum enn hana, vit higartil hava fingið, sigur hann.

Hann heldur annars ikki, at Olshana sá út til at fara at koppa nakran veg, tá skipið stóð á Flesjunum.

- Hetta var í hvussu er ikki tað, sum vit uttanfyri standandi høvdu varhugan av, leggur hann aftrat.

### Eingin samanhangur

Virkandi borgarstjórin í Sjóvar kommunu heldur, at samanhangur ikki var í øllum, sum ført varð fram hesar dagarnar, oljan hótti umhvørvið í Sundalagnum og við Skálafjørðin.

- Vit vistu bara tað, sum fjølmiðlarnir søgdu okkum. Í tíðindunum hoyrdu vit, at kommunurnar vóru við í átakinum at byrgja upp fyri hóttandi oljudálkingini, men vit høvdu tá eingi boð – ei heldur nakra áheitan – fingið um nakað sum helst.

Sonni sigur, at hann fleiri ferðir vendir sær til MRCC fyri at spyrja seg fyri, men kundi einki fáa at vita.

- Ikki fyrr enn sunnumorgunin bleiv eg fyrstu ferð kontaktaður av einum starvsfólki á MRCC, sum segði seg ringja runt og spyrja, um vit ikki høvdu fingið meyl. Tað vísti seg ikki, sum tilbúgvingin í hesi løtu hevði tamarhald á støðuni.

### Sá ikki gott út

Sonni sigur, at honum og øðrum í bygdaráðnum í Sjóvar kommunu dámdu einki, sum út sá serliga vestanfyri leygarkvøldið.

- Vit koyrdu javnan vestur um Tangan at hyggja, og leygarkvøldið kundu vit bara rokna við tí ringasta. Serliga sást nógv olja við Kolbanagjógv og norður móti Selatrað. Her fleyt rættiliga tjúkt av olju, og at síggja til var hetta hydraulikolja saman við gassolju og kanska smyrjolju.

Sonni sigur, at hann rættiliga stúrdi fyri, at her fór at enda rættiliga galið.

- Eitt var, at vit nú stóðu andlit til andlits við eina oljudálking. Annað var, at vit einki fingu at vita, hóast vit royndu at spyrja okkum fyri. Alt virkaði so hjálparleyst.

### Sendara á Flesjarnar

Russiski trolarin er fjórða skipið í røðini, sum siglir á Flesjarnar síðan 1950, og bert eitt av hesum er komið heilskapað av aftur. Hini trý eru endað á havsins botni. Skipini, sum eru farin á Flesjunum, eru Góðanes, Ólavur Gregersen og nú Olshana.

- Tá vit tóku við í Sjóvar kommunu, heittu vit á myndugleikarnar um at seta ein serligan sendarar á Flesjarnar, ein sonevndan raconsendarar, sum gevur ógvuliga kraftmikið ekkó á radaranum. Vit sendu hesa áheitan vitandi um, at vit hava so nógv strandaland í okkara kommunu, bæði vestanfyri og eystanfyri.

Men umbønin varð ikki gingin Sjóvar kommunu á møti.

- Vit fingu at vita, at hetta ikki varð hildið at vera neyðugt, og tískil er eingin slíkur sendari komin. Um ein slíkur sendari hevði gjørt nakran mun í eini slíkari støðu, sum henni, ið Olshana var í, er ógjørligt at siga.

### Oljan skal upp

Sonni Johansen tekur saman um sjálva oljudálkingina og sigur, at nú hann gjørdist høgur í ættini, sær nógv betri úr við Strandalandið.

- Fjøran vestanfyri er nógv dálkað í støðum, men higartil eru vit sloppin rímiliga væl. Vit fara tó at krevja, at oljan, sum eftir er í Olshanu, verður tikin upp úr skipunum, so "tikkandi" umhvørvisbumban, ið henda oljan er, verður burturbeind, sigur virkandi borgarstjórin í Sjóvar kommunu.